## DAGSINS MEINING

# Viðurskifti við ES

Tað hevur leingi vera almen vitan, at stórar broytingar vóru á veg innan ES. Tað eru fleiri ár síðan, at tað sonevnda ES konventið mælti til, at ES skuldi hava grundlóg eins og eitt veruligt ríkjasamband t.d. USA. Hetta kann metast sum eitt avgerandi stig fram til einar sameindu statir í Europa. Samstundis er ES vaksið við fleiri nýggjum eystureuropeisskum londum og griska partinum av Cypros.

Her eru sostatt tvær stórhendingar í ES, sum koma at ávirka Føroyar ávikavist politiskt og búskaparliga. Spurningurin um ES grundlógina og hennara fylgjur fyri Føroyar er ivaleyst tann mest álvarsami í hesum høpi. ES grundlógin merkir, at Danmark fer at flyta myndugleikaøki til ES. Hesin spurningur er nú reistur politiskt. Tað er sjálvsagt í lagi og tað er í tøkum tíma, at vit nú fáa eitt orðaskifti um hendan álvarsama spurning. Men ein má samstundis spyrja, hví hesin spurningur ikki er reistur alment fyrr. Hvat hevur samgongan undan hesari gjørt fyri at fyrireika Føroyar til ta nýggju støðuna? Samgongan undan hesari nýtti nógva orku til fullveldismálið og setti eitt stórt og vælbúgvið embætislið til hesa uppgávu og onnur uttanríkismál. ES viðurskifti var ein náturligur partur av hesum máli eftirsum hesi viðurskifti nema við spurningar sum suverenitet og evsta vald, sum jú aftur høvdu størsta áhuga hjá gomlu samgongu.

Tað hevur sjálvsagt áhuga at fáa at vita, hvat hendan samgongan ætlar at gera við ES málið. Men tað hevur ikki minni almennan áhuga at fáa upplýst, hvat samgongan undan hesari hevur gjørt. Hvørjar fyrireikingar hevur embætisverkið hjá undanfarnu samgongu gjørt við atliti at nýggju støðuni í ES. Her má ivaleyst fyriliggja eitt veldugt tilfar frá embætisverkinum í Tinganesi. Hvørjar ríkisirættarligar avleiðingar metti fyrisitingin hjá fyrrverandi løgmanni og varaløgmanni, at ES grundlógin fór at hava fyri Føroyar? Hvørjar búskaparligar avleiðingar fór víðkanin við eitt nú fleiri fiskivinnutjóðum at hava fyri føroysku fiskivinnuna? Hvussu var politiska viðgerðin av hesum metingum hjá embætisverkinum? Hvørji politisk tiltøk ætlaðu fyrrverandi løgmaður og varaløgmaður at gera til tess at bøta um møguligar negativar avleiðingar. Tað er sjálvsagt heilt í lagi og vælskiljandi, at andstøðan nú reisir hesar spurningar. Men hesir spurningar vóru líka aktuellir fyri tveimum ella seks árum síðani. Teir eru ikki nýkomnir! Tískil hevur almenningurin rætt at kenna tey svar og tey uppskot til loysnir, sum samgongan undan hesari hevði í ES málinum. Hetta er eisini ein fortreyt fyri, at verandi samgonga skal kunna reka tann rætta politikkin við atliti at ES. Einhvør samgonga uttan mun til politiskan lit byggir á undanfarnar samgongur. Og hvat ætlar so henda samgongan at fyritaka sær í hesum so stóra og álvarsliga máli.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tíðarsparingin hjá Alfred Olsen, er tíðspilla hjá Havnarfólki!

**Hallur Hjalgrímsson**
*hallurhj@hotmail.com*



Nú hevur Alfred Olsen aftur verið frammi í bløðunum, har hann hevur greitt frá, hvussu gott og tíðarsparandi tað hevði verið at fingið ein tunnil frá Skálafjørinum og til Havnar. Tí kenni eg meg noyddan at gera nakrar viðmerkingar hesum viðvíkjandi.

Hóast Alfred Olsen við jøvnum millumbilum, hevur skrivað í bløðunum, um hvussu gjarna hann vil hava ein tunnil til Havnar, so er tað ikki ein av okkara fólkavaldu í Tórshavnar býráð ið letur við seg koma. Tað er í sær sjálvum ræðandi, tí um tað sum Alfred Olsen sigur er eftirfarandi, ja so verður ikki liviligt í Havnini eftir at tunnilin ímillum Skálafjørin og Havnina er latin upp.

### Alfred ikki tikið atlit til ferðsluna í Havnini!

Eg vil fyri ein ordans skyld tríva í nakað av tí Alfred Olsen skrivar í greinini „Tunnilsverkætlan Skálafjørður-Tórshavn“ í Sosialinum 17. apríl 2004. Hann sigur soleiðis: „Men ætlanin hjá Landsverkfrøðinginum manglaði totalt tað fíggjarliga atlitið, tí bæði í samband við íløgu og rakstur vildi ætlanin viðføra eina fíggjarliga útreiðslu fyri landskassan“.

Lat tað vera sagt alt fyri eitt, at eg als ikki eri førur fyri at úttala meg um tað fíggjarlig aspektið av tunnilsverkætlanini. Tó má tað vera eitt krav frá almennari síðu, at um ein slíkur tunnil, ið kemur at kosta bróðurpartin av einari milliard, skal borast, so má tað vera óheft av landskassanum.

Um vit venda aftur til greinina hjá Alfred, so sigur hann, at landsverkfrøðingurin totalt manglaði tað fíggjarliga atlitið. Tað skal eg geva Alfred rætt í, men sjálvur hevur hann ikki tikið atlit til tann ferðsluruðuleika, ið ein slík tunnilsverkætlan fer at elva til her í høvuðsstaðnum.

Sum eg áður havi víst á, so er ferðslan í Havn longu nú ein trupulleiki. Tí kann eg ikki annað enn halda Alfred Olsen vera ógvuliga óseriøsan og subjektivan í sínari heildarmeting, av einari møguligari tunnilsverkætlan ímillum Skálafjørðin og Havnina. Hann tekur jú bara tað, ið er positivt fyri seg og síni við. So áðrenn hann langaði út eftir landsverkfrøðinginum, átti hann at sett seg inn í øll aspektini í einari slíkari verkætlan, og ikki bara teimum tingunum ið eru positiv og viðkomandi fyri hansara egna valdømi.

### Tíðarsparingin er ein beinleiðis hóttan!

Ásannast má, at tað sum Alfred Olsen í síni seinastu grein vísir á, er alt annað enn positivt fyri okkum sum búgva her í Havnini. Hann skrivar soleiðis: „Mótvegis hesum verður tann privata undirsjóvarverkætlanin millum Skálafjørðin og Tórshavn, fíggja uttan fyri landskassan og raksturin gevur yvirskot, tí ferðslan verður so nógv og gjaldi lágt, umframt at tíðarsparingin hevði verið millum 30 og 60 min. hvønn vegin“.

Tá eg nú hevði lisi hettar, so var tað fyrsta eg kom í tankar um, akkurát hvønn tað er ið Alfred Olsen hugsar um tá hann sigur, at 30 til 60 minuttir eru at spara. Eg kann í øllum førum staðfesta, at talan neyvan kann vera um borgararnar í Havnini.

Veruleikin er tann, at 30 til 60 minuttir er tann tíðin í fólk her í komununi brúka at koma til arbeiðis sum nú er. Her hugsi eg serliga um barnafamiljur í fyrst skulu í skúla og barnagarð við børnunum, áðrenn tey sjálvi skullu til arbeiðis. Tí er ikki neyðugt at eita Einstein fyri at rokna út, at støðan ikki ferð at gerast betur hvat viðvíkir ferðsluni her í høvuðsstaðnum.

Við hesum í huga, so kann eg ikki taka tað sum Alfred Olsen sigur um lágar prísir og tíðarsparing sum annað enn eina regulera hóttan, og átti hettar at gjørt at ein ávaringarlampa átti at fari og blunka hjá tykkum í sita í Tórshavnar býráð. Men nei, hvørki orð ella eiður.

Bummgjald á Sandvíkarkjalla, eitt møguligt aftursvar!

Um enn ein undirsjóvartunnil skal borast, til Havnar, ja so er neyðugt at seta tiltøk í verk til tess at tálma trýstinum á veganetið í høvuðsstaðnum, og har er ein møguleiki at krevja bummgjald fyri at kunna koma inn í Havnina við bili. Tað vísir seg at rigga væl í øðrum londum, so eingin ársøk er at halda, at tað ikki skal rigga her hjá okkum. Okkurt má í øllum førum gerast, hóttanin er í øllum førum reel nokk. Sandingar hava eisini lagt upp til ein tunnil til Sands. Tí átti hettar at verið nakað ið allir limir í Tórshavnar býráð aktivt áttu at farið og sett seg inn í og havt eina meining um. Ella skal mann bara lata standa til?

# HUGNAKVØLD og 60-ARA DANSUR

Leygarkvøldið 8.mei skipa FSV-stuðlar fyri hugnakvøldi og 60-ara dansi í Síf-húsinum.

Byrjað verður kl.19.30, tá borðreitt verður við smyrjibreyði, øli og sodavatni. Á skránni verður eisini felagssangur og skemt, sum teir báðir Jens Eli Ellefsen og Magnus Magnussen fara at skipa fyri. Borðhaldið varir til umleið kl.23.00. Aftaná verður dansur, har høvi eisini verður at keypa sær okkurt til matna og at sløkkja tostan við.

Thunderbirds úr Vestmanna og Teenagers úr Sandavági fara at spæla til dansin.

Tekningarlistar liggja frammi Hjá Ingu í Sandavági og Mylluni í Miðvági. Eisini ber til at boða frá luttøku á tlf. 332806 og 333216 í seinasta lagi fríggjakvøldið kl. 20.00.

*Fyrireikararnir.*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Manglandi virðing fyri journalistiska fakinum

**Johan Petersen**



Um ein almennur loftmiðil skal vera politiskt óheftur má hann hvørki kunna mistonkjast fyri og enn minni geva ávísum politiskum flokki ella politiskari hugsan framíhjárætt. Hetta liva hvørki sjónvarpið ella útvarpið upp til!

Katrin Petersen, tíðindaleiðari í sjónvarpinum tekur harliga til orðanna móti páhaldi mínum í bløðunum, um at loftmiðlarnir ikki reka óheftan tíðindaflutning. Einasta mótargument tykist vera, at sjónvarpið ikki nýtir stoppur fyri at deila sól og vind líka millum politisku flokkarnar.

Men hetta er heldur ikki neyðugt - tað sum hevur stórstan týdning er, hvat fatan hevur hyggjarin eftir eina tíðindasending og hvussu er sjónvarpið ført fyri at fylgja við í tí, ið fyriferst og geva eina óhefta og breiða lýsing av hesum.

### Frælsið sett hægri enn skyldan at vera óheftur

Katrin hevur púra rætt, tá ið hon lýsir yvirornaðu málsetningunum hjá einum frælsum loftmiðli. Men tó tykir mær, at hon setir frælsið hjá journalistunum hægri enn skylduna at vera óheftir. Hon ger sera nógv burtur úr frælsi hjá tíðindafólki sjálvi at gera metingar og taka avgerðir og at hyggjarin einans hevur fjølmiðilin at líta á. Hetta frælsi ber ikki í sær, at tíðindini verða óheft - um tíðindafólki ikki virðir journalistiska fakið hægri enn egin áhugamál.

Tað sær út til, at journalistarnir taka sær sera nær, um nakar dittar sær til at vísa á skeivleikar. Men tíðindafólk mega vera greið yvir, at við ófullfíggjaðum lógargrundarlagi, har ongin fjølmiðlaábyrgdarlóg enn er komin, 6 ár eftir, at víst verður til hana í kringvarpslógini, so setir hetta enn størri krøv til tíðindafólk og tey megu lata sær lynda, at onnur eisini hava eina meining og gera metingar av tíðindaflutninginum.

### Tjóðveldispolitikari í tíðindaredaktiónini

Um sjónvarpið skal vera óheft, er avgerandi, at tað hvørki kann mistonkjast fyri og enn minni geva ávísum politiskum flokki ella politiskari hugsan framíhjárætt. Hetta var aðalreglan í teirri sjónvarps- og útvarpsnevnd, eg sjálvur sat sum formaður fyri, og sum hevði programábyrgdina í bæði sjónvarpi og útvarpi, inntil hesar nevndir vórðu tiknar av. Men við einum enntá aktivum tjóðveldispolitikara í tíðindaredaktiónini ella í øllum førum sera tætt upp at henni, biður sjónvarpið um, at illgruni verður reistur um trúvirðið í rikna tíðindaflutninginum.

Og at tíðindadeildin í sjónvarpinum ikki livir upp til at vera óheft, vísir dømið, eg nevndi í páhaldi mínum, har Bárður Nielsen og Høgni Hoydal dystast um fíggjarlógina. Fari at biðja Katrina hyggja aftur eftir hesum kjaki og meta, um hetta var góður journalistikkur. Var orðstýrarin óheft? Var hon líka kritisk mótvegis báðum pørtum? At verið eitt sindur meiri høvisk, hevði so ikki tikið nakað frá innslagnum.

### Eisini útvarpið

Eisini útvarpið er sjálvt við til at sáa illgruna um sína óheftu støðu - eisini við einum aktivum tjóðveldispolitikara í programmleiðsluni. Og sum enn eitt dømi um forrættin hjá tjóðveldisflokkinum kann nevnast fyrispurningurin hjá Høgna Hoydal til Bárð Nielsen um tíðindaskriv í samband við fíggjarlógina, har hesin fyrispurningurin var viðgjørdur í nærum eina heila viku í tíðindunum, meðan neyvan nakar mintist til, hvat stóð í tíðindaskrivinum hjá Bárði Nielsen.

# Soleiðis blíva vit øll rík?

**Hans Birgir Hansen**
*ps. Tann einasti orkusjeikurin í Føroyum*



Við at tálma dagligu forbrúksnýtsluni kunnu øll gerast rík. Og við at hækk avgjald av lánum og stytta lánstíðina kunnu vit spara rentur av avgjøldum, ið eru tyngjandi hjá øllum! Vit kunnu við at avmarka keyp av góðgæti, heilivági, rúsdrekka, rúsevnum, tubbakki og ístaðin gera íløgu í heilsustøðuna hjá familjuni og vit kunnu spara sjúkradagar.

Vit kunnu troyta allar møguleikar betur, uttan at líða hungur og hall, og uttan at sita í køldum og myrkum húsum, tá ið vit broyta raðfesting, prioritering av hvat vit nýta pening til.

Vit kunnu fremja orkusparing í tí dagliga húsarhaldinum við teimum nógv umrøddum spariperunum og við at fáa javnvág í okkara hitaskipan við einum flógvum hita í øllum húsarúmum. Vit skulu opna termostatar, ventilar, á øllum radiatorum í øllum húsarúmum. Tá ið hesir blíva heitir, regulera vit hitan niður eftir við hjálp av chuntventili framman á oljufýrketlinum. Vit skulu koma niður á vanligan stovutemperatur. Vanliga fer allur spillihitin við tí rúkandi ferð ígjøgnum avtreksrørið út í skorsteinin og upp gjøgnum hendan til ongan verðsins nyttu. Vit skulu gera greitt við múrsteinum inn í forbrenningskamarinum liggjandi tvørtur um miðjuna, skulu gera greitt er atvoldin til áðurnevnda og at vit ikki fáa útnyttað spillihitan.

Hetta er óreingjandi veruleikin, ið eingin av sethúsaeigarum nakrantíð hevur hugsað um, ið glaðbeint lata oljufýruservisumenn villleiða seg, ið eru kappingarneytar hjá mær í Havnini í dag. Vit kunnu gott seta termostatar, ventilar, á allar radiatorar á t.d. 3 og chuntventilin frammman á oljufýrketlinum, tá áðurnevndu radiatorar eru blivinir heitir, tá hava vit fingið javnvág. Við at sløkkja oljufýrketilin, tá hesin steðgar, og taka brennaran frá, opna lúkuna, sleppa inn í forbrenningskamarið, taka út leysu múrsteinar, lata lúkuna aftur og seta brennaran til aftur. Vit seta so termostatin fimm strikur niður og chuntventilin á 3, vit tendra so oljufýrketilin, ið startar tá termometrið er komið fimm strikur niður. Síðan stilla vit við skrúvublaði oljuflammuna.

Hetta eru royndir, ið ein hevur frá seinast í sjeyti- og fyrst í áttatiárunum, tá ein skipaði fyri almennum orkusparandi fundum og greiddi frá kubbasparing í oljufýrdum ketlum kring landið og í Havn.

Eg havi hugsað nógv um at taka upp aftur orkusparandi og og oljusparandi táttin, síðani kappingarneytarnir eru farnir higani frá. Eg fekk kunnað um ætlanir V. H. Flach sála og undirritaða.

# SEV ljósa framtíð

**Súni í Hjøllum**
*Umboðsnevndarlimur*
*f. Nes kommunu*



Sum umbosðnevndarlimur fyri Nes kommunu í SEV síðan 1989 havi eg mangan víst á, at ávísar bygnaðarbroytingar, sum høvdu til endamáls at lata felagsskapin meira upp, høvdu gagnað. Fyri tveimum árum síðan hevði eg uppskot um at lata umboðsnevndarfundirnar gerast almennar, men eisini ta ferðina varð ikki neyðugur meiriluti.

Tað er tí at fegnast um, at umboðsnevndarfundurin 19. mars 2004 nærum einmælt samtykti at broyta viðtøkurnar, so leikluturin hjá umboðsnevnd, umboðsnevndarformanni, stýri, stýrisformanni og stjóra koma í eina fastari legu. Nú verða umboðsnevndarfundirnir eisini almennir, og tað fer at geva munandi meira gjøgnumskygni. Allir føroyingar eiga SEV, og hava tí samb. nýggju kommunulógini og nýggju fyrisitingarlógini rætt til innlit.

Tað er ikki ov nógv sagt, at við stovnanini av SEV løgdu kommunurnar í sínari tíð lunnar undir ein slóðbrótandi framburð fyri Føroyar og føroyingar. Tað er tí at vóna, at tey, sum mynda felagsskapin, leggja doyin á at fylgja væl við á øllum økjum, so at felagsskapurin eisini mennist og tekur við nýggju og stóru avbjóðingunum, sum liggja fyri framman.

Við nýggju viðtøkubroytingunum í huga - eisini um fyrilit fyri náttúru og umhvørvi, eri eg onga løtu í iva um, at tað ber til at skapa SEV eina ljósa framtíð!

Tíðindaskriv:

# Ættarstevna hjá Smiðjufólkunum í Fámjin

Tey seinnu árini er tað vorðið alt meir vanligt at ættir møtast og nú eru tað nøkur, ið halda, at tað er uppá tíðina, at eftirkomarnir hjá Daniel Johan Lisberg (f. 20-01-1838 d. 25-02-1899) og Ellen Caroline Lisberg (f.18-11-1839 d. 25-03-1932) í Smiðjuni í Fámjin møtast.

Ætlanin er, at vit skulu møtast tann 24/7 2004 og verður tað í Høllini í Trongisvági. Best hevði sjálvandi verið at hittst í Fámjin, men av tí at eftirkomararnir hjá Daniel Johan og Elin eru sera nógvir, er tað ómøguligt at hýsa so nógvum fólki í Fámjin, so tí hittast vit í Trongisvági, men har er eisini sera gott at vera.

Dagurin byrjar kl. 16.00 við at vit hittast og koma at kenna hvønnanan. Kl. 19.00 byrjar so veitsla við døgverða og dansi aftaná. Lisbergarnir plaga at vera lívligir og duga at skemta sær, so har skuldu allar fyritreytir verið fyri at fingið eitt gott kvøld.

Kostnaður fyri tiltakið er kr. 250,- fyri vaksin og kr.100,- fyri børn undir 12 ár.

Seinasta freist at gjalda atgongumerki er 15/6-2004. Møguleiki er at keypa atgongumerki hjá Súsannu Lisberg í Fámjin tlf.371502 og flyta pengarnir á konto í Føroya Banka.Tey, ið flyta gjøgnum bankan, nýta kvittanina sum atgongumerki.

Er nakað at spyrja um, so eru tit vælkomin til at spyrja hjá onkrum av fyrireikarunum.

Fyrireikarir eru: Johan í Smiðjuni Fámjin, tlf. 371359. Jákup Jakobsen Fámjin, tlf. 371356. Ebba í Geilini Fámjin, tlf. 371496. Elin Poulsen Fámjin, tlf. 371842. Súsanna Lisberg Fámjin, tlf.371502. Magnus Magnussen Tórshavn, tlf. 321104

Fyrireikararnir vóna, at nógv fólk koma saman, at hitt frændir sínar.

